## Páskastevna hjá Oasuni

Eins og undanfarin ár skipar FRÍKIRKJAN OASAN fyri stórari páskastevnu. Jerome Ocampo frá Filippinunum verður høvuðstalarin hesaferð. Hann er væl kendur her heima í Føroyum, tí hann hevur vitjað Oasuna tríggjar ferðir fyrr: Samstundis, sum hann er sera virkin í ómetaliga stórum ungdómsarbeiði á Filippinunum (www.jesusrev.com), er Jerome meira og meira eftirspurdur altjóða prædikumaður. Hann er ein brennandi persónur við einum livandi og hugtakandi andaligum boðskapi. Håvard Berger, ungdómsleiðari frá Kristkirkjuni í Bergen vitjar eisini saman við 27 ungfólkum úr Noregi, teirra millum eisini nøkrum úr Føroyum. Hesi koma mánadag 17. mars og fara avstað aftur hósdag 27. mars. Tey fara at hava ymisk andalig tiltøk við talu, vitnisburði, lovsangi, dansi/drama v. m. saman við okkara egna ungdómsbólki, umframt at tey fara út í býin at tosa við fólk og biðja fyri sjúkum. Skráin annars verður lýst í bløðunum.



# Ynskja kirkjugarð við Svartafoss

**Á borgarafundi í Hoyvíkar Kirkju í gjárkvøldið legði Tórshavnar Kommuna fram ein lista yvir møgulig nýggj kirkjugarðsstøð. Fitt av fólki var møtt upp, og tey flestu tyktust samd um, at Svartifossur var besta staðið til ein nýggjan kirkjugarð**

KIRKJUGARÐUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Tórshavnar Kommuna eigur eina trøð undir Svartafossi, sum liggur nær við Hoyvíkar Kirkju og hini samkomuhúsini í Hoyvík. Og semja tyktist vera á fundinum um, at hetta øki er best egnað. Ikki minst, tí tað er so hugnaligt og fjálgt*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hvørt ár verða 100 til 120 fólk jarðað í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin. Hetta krevur, at eitt nýtt øki á 530 kvatratmetrar verður lagt afturat hvørt ár, og mett verður at um fimtan ár verður tørvur á 900 nýggjum kvatratmetrum hvørt ár.

Hetta vóru nøkur av hágtølunum, sum Tóri í Hoyvík, býargartnari í Havn, legði fram á almennum fundi í Hoyvíkar Kirkju í gjárkvøldi. Fundurin var komin í lag, tí kirkjuráðið í Hoyvík fleiri ferðir hevur eftirlýst, at kommunan tekur støðu til og fer undir at gera nýggjan kirkjugarð í Hoyvík.

- Tað er løgið at byggja ein nýggjan bý og hugsa um alt møguligt, kirkjur, samkomuhús, skúla, ítróttarøki og so víðari. Men als ikki hugsa um ein nýggjan kirkjugarð, helt Katrin Dahl, forkvinna í bygginevndini fyri Hoyvíkar Kirkju, fyri, tá hon bjóðaði vælkomin í tættpakkaða fermingarrúminum í kirkjuni.

- Tað skuldi vera púra náttúrligt, tí tað er meira vist, at vit øll skulu í kirkjugarðin enn, at vit fara ein túr í eina ítróttarhøll.

Katrin Dahl greiddi frá, at fleiri fólk høvdu vent sær til kirkjuráðið við ynskjum um nýggjan kirkjugarð. Málið hoyrir til kommununa, men hóast kirkjuráðið fleiri ferðir hevði heitt á býráðið, so er einki hent í málinum. Tí varð nú skipað fyri borgarafundi. Fyri at seta skubb á.

### Fleiri møgulig kirkjugarðsstøð

Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin varð tikin í brúk í 1935, og har er framvegis pláss til nógv nýggj gravstøð, men øki er ikki óendaligt. Býargartnarin hevði kannað onnur møgulig støð í ella nærhendis Hoyvík, og niðurstøðan var, at tað vóru fleiri øki, sum vóru brúkilig til kirkjugarð.

Listin hjá býargartnaranum var hesin: Dalurin Langi, sum er settur av til frí- og frítíðarøki. Hetta øki er tað, ið liggur nærmast Hoyvíkar Kirkju, bara 400 metrar burturfrá. Kúrdalur, sum liggur oman í móti Fornminnissavninum í Gomlu Hoyvík, er eisini ein møguleiki, har er sera vakurt og frítt. Eitt annað vakurt og kanska meira fjálgt stað er undir Svartafossi. Har eigur kommunan eina trøð, sum kann brúkast til kirkjugarð. Longur niðri í Hoydølum er eisini ein møguleiki, og seinasta uppskotið var niðanfyri Sandvíkar Hjalla, har eitt stórt frítt øki er tøkt.

Spurningurin um at endurnýta gomlu kirkjugarðarnar var eisini uppi at venda. Petur Martin Rasmussen, prestur, segði, at tað var gamal føroyskur siður, at endurnýta gravstøð ella grava omanyvir gamlar gravir. Tí eru føroysku kirkjugarðarnir so smáir.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, helt ikki, at hetta var ein góð loysn, men orðstýrarin á fundinum, Gunn Ellefsen, helt, at hon einki hevði havt ímóti, at hennara grøv var endurnýtt, tá eingin var eftir, sum vitjaði grøvina.

### Livandi kjak um endastøð

Hugurin at skifta orð um nýggja kirkjugarðin var stórur, og fleiri komu við teirra íkasti. Heðin Mortensen, borgarstjóri, legði fyri og segði seg vera fegnast um uppskotið um Kúrdal, men Sandvíkar Hjalli var eisini ein møguleiki.

Helle T. Johansen, sum hevur skrivað tíðargrein um evni í Sosialinum í dag, segði í viðmerking, at hon helt tað hava stóran týdning, at staði var eitt gott og hugnaligt stað at koma, í mun til kirkjugarðin við Velbastaðvegin, har tað er slætt og veðurhart.

Bente Kjær, limur í kirkjuráðnum, tók undir við hesum og helt, at Svartifossur var ein upplagdur møguleiki, tí har er møguleiki fyri at skapa ein hugnaligan og fjálgan kirkjugarð. Fleiri fundarluttakarar tóku undir við hesum og hildu, at Svartifossur var best egnaða staðið.

Bjarni Bæk, prestur, vísti eisini á týdningin av, at kirkjugarðurin ikki lá alt ov nær tungari ferðslu. Tungir lastbilar koyra hvønn dag eftir Velbastaðvegnum, og hetta kann órógva jarðarferðir, og økið úti við Sandvíkarhjalla helt hann liggja ov tætt at vegi við nógvari ferðslu.

Tá Katrin Dahl so dróg